Um almannapensiónir og broytingar í skattinum

Hækkaður pensionistafrádráttur (skattafrádráttur)
Allir pensiónistar fingu við broytingunum í pensiónslógini hægri pensión. Fyri at hækkingin skuldi síggjast aftur til fulnar í tøkum peningi hjá tí einstaka, hevur verið neyðugt at gera broytingar í skattingini av pensiónum. Tí er sonevndi pensiónistafrádráttur hækkaður hjá øllum pensiónistum.

Serligur frádráttur í inntøku hjá miðal og hægstu fyritíðarpensiónistum
Hækkingin í frádráttinum hjá øllum pensiónistum er tó ikki nóg mikið, um eisini hægstu og miðal fyritíðarpensiónistar skuldu merkja hækkingina í pensiónini til fulnar. Tí samtykti løgtingið samstundis broytingar í skattalógini, sum geva hesum pensiónistum ein serligan frádrátt í pensiónsinntøkuni. Frádrátturin skuldi fremjast við at broyta lutfallið millum skattskylduga og ikki-skattskylduga partin av pensiónsútgjaldinum.

Frádrátturin er ein mestaupphædd á tann hátt, at hann ikki verður latin fult út, um skattskylduga viðbótin hjá einum pensiónisti, orsakað av aðrari inntøku, minkar.

Henda broyting hevur við sær, at miðal og hægstu fyritíðarpensiónistar við pensiónsútgjaldinum fyri mai fara at fáa eina fráboðan frá Almannastovuni við broyttum viðbótum. Serliga persónliga viðbótin,ið er skattafrí, er hækkað, meðan vanliga viðbótin,ið er skattskyldug, er lækkað. Ein minni partur av pensiónini verður sostatt skattaður. Pensiónsupphæddin tilsamans er tó hin sama sum frammanundan.

Broytingarnar eru lýstar í talvuni niðanfyri, sum tó einans lýsir viðurskiftini hjá teimum miðal og hægstu fyritíðarpensiónistum, sum ikki hava aðra inntøku og tí fáa fullar upphæddir.

Miðal fyritíðarpensiónistur – giftur

	Ásettar upphæddir	Broyttar upphæddir
Viðbót	2.483	1.158
Serlig persónlig viðbót	160	1.485
Tilsamans	2.643	2.643

Miðal fyritíðarpensionistur – stakur

	Ásettar upphæddir	Broyttar upphæddir
Viðbót	3.003	1.653
Serlig persónlig viðbót	160	1.510
Tilsamans	3.163	3.163

Hægsti fyritíðarpensiónistur – giftur

	Ásettar upphæddir	Broyttar upphæddir
Viðbót	4.430	2.938
Serlig persónlig viðbót	160	1.652
Tilsamans	4.590	4.590

Hægsti fyritíðarpensiónistur – stakur

	Ásettar upphæddir	Broyttar upphæddir
Viðbót	5.695	4.303
Serlig persónlig viðbót	160	1.552
Tilsamans	5.855	5.855

www.sosialurin.fo

AEROBIC OG SPINNING

NÚ BYRJA VIT AFTUR

***Yndi** kann bj a flest ¿llum okkurt slag av kropsvenjing. Kvinnum sum monnum, ungum sum eldri, st rum sum sm um, sterkum sum veikum.*

Byrja ver ur aftur m nadagin, 01. mai og halda vit til leygardagin, 24. juni.

Nýtt Nýtt Nýtt SPINNING Nýtt Nýtt Nýtt

Sum naka spinnandi n tt kunnu vit n fyri fyrstu fer F¿royum bj a t mar SPINNING, sum seinastu rini er vor in sera v lumt kt v a um. SPINNING er sera gott fyri ¥¿lungu og bl rensli sum heild. Eisini er SPINNING sera konditi nsstimbrandi og samstundis ein gvuliga g ur h ttur at kl nka seg. Samstundis kann SPINNING kast av ¿llum, eisini teimum vi veikum li um ella ryggi.

T irnar eru:

Mánadag	Týsdag	Mikudag	Hósdag
	19:00 — 19:50 Spinning *Byrjarar*		18:30 — 19:20 Spinning *Byrjarar*
18:30 — 19:30 Spinning *Vand*	20:00 — 21:00 Spinning *Vand*	18:00 — 18:50 Spinning *Byrjarar*	19:30 — 20:30 Spinning *Vand*

KOSTNAÐUR FYRI ALT SKEIÐIÐ

		Skúlanæmingar
1 fer um vikuna:	300 kr.	20% avsl ttur
2 fer ir um vikuna:	490 kr.	20% avsl ttur
3 fer ir um vikuna:	650 kr.	

AEROBIC

Trimmari — Aerobic — Stepp + styrkivenjing — Venjing uttan hopp — Mix.

T irnar eru:

Mánadag	Týsdag	Mikudag	Hósdag
17:30 - 18:45 Aerobic *Vand*	18:00 - 19:00 Stepp *fill*	17:15 — 18:15 *Tilkomnar kvinnur Low*	17:15 — 18:30 Stepp + Styrki *fill*
18:45 - 19:45 Aerobic *Byrjarar*	19:00 — 20:00 Trimmari *fill*	18:15 — 19:15 Aerobic *Byrjarar*	18:30 - 19:30 Aerobic *fill*
	20:00 - 21:15 Mix str vin *Vand*		

KOSTNAÐUR FYRI ALT SKEIÐIÐ

	60 min.	75 min.	Skúlanæmingar
1 fer um vikuna :	300 kr.	375 kr.	20 % avsl ttur
2 fer ir um vikuna:	490 kr.	600 kr.	20 % avsl ttur
3 fer ir um vikuna:	650 kr.	810 kr.	

Vigar t ov n gv? ....Her er kjansurin!

Spinn FEITTKNÚSARI

Sum naka n tt bj a vit teimum, i viga meiri enn 10 kilo ov n gv, venjing tv r fer ir um vikuna. Byrja ver ur vi styrkivenjingum fyri b k, rygg, enda, armar og bein. S ani ver ur fari at spinna, har ta serliga er bl rensli og feittbrenningin, i dentur ver ur lagdur .

T irnar eru:

Mánadag	Mikudag
19:45 - 20:15 Trimm 20:15 - 21:15 Spinn	19:15 - 19:45 Trimm 19:45 - 20:45 Spinn

KOSTNAÐUR FYRI ALT SKEIÐIÐ

650,- kr.

F meira at vita hj Yndi, kom framvi og f t r ein faldara og eitt pr t.
M¿guligt er at f a keypis royndart ma SPINNING og AEROBIC. M¿guleiki er hj fel¿gum, fyrit¿kum o.¿. at leiga t mar Yndi.

Tilmelding verður í Yndi, Yviri við Strond 21, leygardagin tann 29. apríl frá kl. 15.00 til kl. 17.00

Komi inn g lvi ella ringi tel.: 311 311, 310 025 ella 312 868.

YNDI
v/ Elsu Mariu B rentsen

Sosialurin - 311820

Yviri við Strond 21 **Tlf.: 311 311**
FO-100 Tórshavn **Fax: 318 527**
e-mail: yndi@post.olivant.fo

nøvn nú

Heilsanir

Góa elska›a Hjørdis
Nú fyllir tú fimm ár. Hjartaliga tillukku vi› fø›ingardeginum.
Ynskja babba, mamma, Sára, Sjúr›ur og Heykur

nøvn nú 5 ferðir um vikuna 25,- kr.

GEVIÐ GÆTUR:
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 25,- kr. pr. mynd í krossaðum kekki fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjalda í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur: .....
.....
.....
.....
.....
.....

MYNDINA AFTUR: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur **(skal fyllast út).**
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Tíðindablaðið Sosialurin
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»NØVN NÚ«**

Tiltøk

Ebenezer
Sunnudagin kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti og kl. 21 útimøti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 06 morgunbøn, kl. 21 ungdómsmøti, í morgin kl. 06 morgunbøn, kl. 17 landsbøn.
Sunnudagin kl. 06 morgunbøn, kl. 11 morgungudstænasta, kl. 18 møti.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla, sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 vitnimøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Rhema á Hálsi
Leygarkvøldið kl. 21 verður Cafékvøld har Eyðun Jacobsen luttekur við sangi og vitnisburði. Sunnudagin kl. 11 morgunmøti og sunnudagsskúli. Hósdagin og fríggjadagin kl. 06 morgunbøn. Øll eru vælkomin.

Møtiskrá
fyri Føroyatúr hjá Hera Élttør, trúboðara:
30. apríl: Á Skála.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Sunnukvøldið kl. 18 møti við Knút Larsen.

Meinigheitshúsið í Havn
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti v/ Gunnar Reynslág o.ø.

Frelsunarherurin í Havn
Fríggjadagin kl. 20.30 ungdómsklubbur. Sunnudagin kl. 11 møti, Ruth og Gordon Cocking leiða og tala, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti, Irena og Eyðun Christiansen luttaka.

Keldan, Skálafirði
Alpha-legan byrjar leygarmorgunin kl. 09.30, tessvegna einki opið hús leygarkvøldið. Sunnudagin møti kl. 17. Barnamøti kl. 17.
http://kort.olivant.fo/~keldan/

Filadelfia, Gøtu
Leygardagin kl. 16 verður barnamøti, kl. 20 evangeliskur fundur og kl. 22 verður ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 18 verður møti fyri alla familjuna, børn og vaksin. Svenning av Lofti, Óla Hendrik av Fløtum og Jens Hammer Egholm luttaka á øllum møtunum.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 21.
Møti verður leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18. Luttøka norðanfjørs við talu og sangi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Ítróttarhøllin í Klaksvík
Tiltakið sum Heimamissiónin skipar fyri: Sunnudagsskúlin ár 2000 »Eingin er ov lítil til Jesus«, verður sunnudagin 30. apríl kl. 15. Tiltakið er fyri allar Norðuroyggjar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Ungdómshúsið á Eiði
Eingin ungdómsløta verður fríggjakvøldið. Víst verður til felagsungdómsmøti á Glyvrum, leygarkvøldið kl. 20.

Kirkjan, Norðskála
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 uppbygg. fundur.

Samkoman, Sion Vági
Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00, kl. 11.30: Sunnudagsskúli. Evangeliskt møti kl. 18.00.
Telefonandaktin svarar á 373777.

Aglow, Suðuroy
Fundur verður í Porkeris skúla leygardagin kl. 16. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Opið er hvønn mánadag kl. 10.00-18.00 og týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
Túrur 10. mai kl. 9.30 úr Steinatúni, vit vitja Tøting, kirkjuna í Gøtugjógv, fornminni í Norðragøtu og síðan verður farið til Runavíkar at eta døgurða á Sjómansheiminum. Aftur í Havn umleið kl. 17. Tilm. tlf. 316491. Kostnaður 100 kr. skal gjaldast áðrenn.
Ein skúlamyndaframsýning verður í Tilhaldinum á Ólavsøku. Myndir eru frá skúlum í Havn gjøgnum tíðirnar. Áhugi er at lána gamlar myndir av skúlabørnum, lærarum, útferðum o.ø. til framsýningina. Tilhaldið, tlf. 316491.
Mikudagin 26. apríl
Kl. 10-13 Fyrireiking til døgurðan
Kl. 12 Døgurði
Hósdagin 28. apríl
Kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
Kl. 14-17 Teldupratt, Brandur Petersen
Fríggjadagin 29. apríl
Kl. 15 Vit syngja, pannukøkur verða at fáa.
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

1000-ára haldið
Leygardagin 29. apríl kl. 16 letur framsýningin um kirkjurnar í Føroyum upp í skúlanum á Giljanesi. J. P. Gregoriussen, arkitektur hevur skipað fyri og greiðir frá.
Leygardagin 29. apríl kl. 15 heldur Meinhard Bjartalíð, prestur fyrilestur um Grundtvig í kirkjuni á Húsum.
Sunnudagin 30. apríl kl. 16 heldur Marjun Bæk, prestur, fyrilestur um Thomas Kingo í kirkjuni í Bø. Havnarkórið syngur.
Sunnudagin 30. apríl kl. 16 lesur Ebbe Rasmussen, prestur, fyrilestur hjá Axel Tórgarð um Petter Dass í kirkjuni í Hesti. Tórshavnar Manskór syngur.
Sunnudagin 30. apríl kl. 16 verður »Fagnaðarljóð« í Vesturkirkjuni. Andakt verður við Alfred Olsen. VOX v/Ásbjørn Berthelsen, Frelsunarherurin. Sigrid Sivertsen leiðir. Victor Carlsen spælir.

Felagið Tórshavn gongutúrur
Leygardagin 29. apríl verður gongutúrur: Fram við fjørðuni úr Streymnesi og suður eftir. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 14.30. Havið ein drekkamunn við og heit og góð gonguklæði. Tilmelding.

Eysturoyar Gongufelag
Gongutúrur verður sunnudagin 30. apríl. Gingið verður út á Eystnes. Túrurin er lættur-miðal. Vit møtast við mylluna kl. 14. Drekkamuður verður eftir túrin á Sjómansheiminum. Tekning fer fram á Eysturoyar kunningarstovu tlf. 449449.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fríggjakvøldið fundur frá kl. 20-21 og 22.30-23.30.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla (gamla læraraíbúðin).

Blái Krossur
bjóðar til eftirviðgerð hvørt **mánakvøld** á skrivstovuni hjá Bláa Krossi **á Glyvrum,** kl. 20–21.30. Nærri fæst at vita á tlf. 315575.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 19.00 til 21.00. Tlf. 212380.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

Bahá'í Miðstøðin í Gundadali
Fyrsta leygardag hvønn mánað: Altjóða nátturði «Potluck» kl. 18.30.
Opið hvørt fríggjakvøld: Samkoma kl. 20.
Bahá'í-samfelagið í Tórshavn

Felagið Føroyar-Kuba
Skrivstova og felagshøli felagsins er í Bringsnagøtu 10, Tórshavn. Opið er hvørt mikukvøld kl. 19.15-20.15.
Postadressan er:
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf. 313016 og 312098. Fax 313016.
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com

Føroya Astma/ Allergifelag
Postadressa MBF-húsið, Íslandsvegur 10c.
Felagið hevur Tlf./fax 311419.

Giktafelag Føroya
tlf. 44 48 03 fax 44 51 04
e-mail: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan í MBF húsinum hevur opið mánadag frá 14.00 til 16.00, tlf. 310237 ella støkk inn á Íslandsvegi 10 C, Tórshavn.
Foreldrabólkurin at giktsjúkum børnum, Betty og Noel Joensen, Klaksvík, tlf. 45 73 37 eftir arbeiðstíð.
Ungdómsbólkurin: Sára Tummassardóttir, tlf. 37 31 06 eftir skúlatíð, ella e-mail: sara@post.olivant.fo

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

Javni
Skrivstovan í N. Finsensgøtu 32, tlf. 314827, fax 310557 er opin soleiðis:
mánadag er stongt,
týsdag kl. 10-12,
mikudag kl. 10-12,
hósdag kl. 10-14,
fríggjadag kl. 10-12.
Frítíðarklubbin hevur ymiskar aktivitetir í kjallaranum hjá Javna. Nærri fæst at vita um hetta, við at venda sær til skrivstovuna.

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

MBF
Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Sosialráðgevin er at hitta hvønn mánadag millum kl. 10.30-12. Ring og avtala tíð á tlf. 31 73 73.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

Konfirmantar í Nólsoyar kirkju sunnudagin 30. apríl 2000.

Finnbogi Berg
Jannik Gade
Óluva Hansen
Borgfríð Jakobsen

Konfirmantar í Funnings kirkju 1. sunnudag eftir páskir

Av Eiði:
Edith Kruse, Doris í Garði Joensen, Magna Eliana Mørkøre, Durita Kallsoy og Eyð Hentze
Frá Norðskála:
Jógvan Páll Kristiansen, Jákup Sumberg, Hjalmar Johannesen, Leif Niclasen og Mariann Hansen
Av Oyri:
Ólavur Joensen og Elin Debes
Úr Funningi:
Anina Juul Johannesen

Konfirmantar í Rituvíkar kirkju 1. sunnudag eftir páskir

Jonna Gaardbo, Søldarfjørður
Alberta Malena Gaardlykke, Glyvrar
Justinus Heini Hansen, Saltangará
Rói Hansen, Toftir
Sóleyg Matras á Hálvmørk, Toftir
Heidi í Hjøllum, Saltnes
Ragnar í Holusteini, p.t. Glyvrar
Hildigerð Højgaard, Saltnes
Fróði Jensen, Toftir
Áki Skaale Joensen, Toftir
Jónvá Joensen, Runavík
Niklas Fríðrikur Joensen, Toftir
Ann Mari Róin Johannesen, Æðuvík
Magnus Knudsen, Saltangará
Teresa Magnussen, Lamba
Kári Skibenæs Nielsen, Skipanes
Sigurd Jákupsson Nielsen, Runavík
Anna Olsen, Æðuvík
Dánjal Olsen, Toftir
Egil Olsen, Rituvík
Ragnfríð Nord Olsen, Rituvík
Margit Petersen, Saltnes
Jóhan Petur Poulsen, Toftir
Sigrun Morid Simonsen, Saltangará
Maria Tausen, Saltangará

Konfirmantar í Hvannasunds kirkju 1. sunnudag eftir páskir

Bjørg Mohr, Viðareiði
John Simonsen, Viðareiði
Mariann Rubeksen, Hvannasund
Sólvá Simonsen, Hvannasund
Signa Jacobsen, Hvannasund
Signar í Frammistovu, Hvannasund
Dan Nysted, Hvannasund
Kaj Eli Sørensen, Hvannasund

Prógv

Tormann J.V. Jacobsen, Tórshavn, hevur lokið yrkisútbúgving sum bilmekanikari. Læruplass: D.B. Bilar, Tórshavn.

Kári I. Jakobsen, Tórshavn, hevur lokið yrkisútbúgving sum maskinsmiður. Læruplass: Noma-Tek, Tórshavn.

70 ár

Fríggjadagin 28. apríl fyllir Victoria Tróndheim, Leirvík, 70 ár. Dagurin verður hildin hjá Jakku og Fridu Tróndheim, leygardagin 29. apríl.

Konfirmatión

Sunnudagin tann 30. apríl í Skelager kirke verður Maria Djurhuus Petersen, (dóttir Anitu W. Petersen og Ingemar Djurhuus) konfirmerað.
Bústaður: Skelagervej 237, DK-8200 Århus N.